# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað harmar meg, um eg havi kostað McCain so mikið sum eina atkvøðu, tí hann er eftir mínum tykki hetjan*

*Sarah Palin*



*Barrack Obama saman við Rahm Emanuel, sum sambært keldum skal hava fingið tilboð um at starvið sum umsitingarleiðari í Hvítu Húsunum*
*Mynd: AP)*



*Gamli uttanríkisráðharrin Colin Powell, kann fáa eitt leiðandi embæti í stjórnini hjá Obama*
*Mynd: AP*




*John Kerry tapti forsetavalið ímóti Bush í 2004. Nú verður hann kanska ráðharri*
*Mynd: AP*

# Obama leitar eftir fólki

**Tann størsti spurningurin er, hvør skal umsita uttanríkismál, og um nakar ráðharri hjá Bush sleppur at halda fram**

So skjótt amerikanararnir høvdu svarað spurninginum, hvør skal taka við sum forseti eftir George W. Bush, kom spurningurin, hvør skal stýra saman við vinnarunum. Hvør skal eitt nú í uttanríkisráðið fyri Condolezza Rice, og hvør hevur vilja, evni og ikki minst hug til at átaka sær fíggjarmálaráðið, nú landið er í kreppu?

Í USA hevur starvsfólkaleiðarin í Hvítu Húsunum stóra ávirkan, og hann verður ofta umrøddur sum høgra hond forsetans. Tí hevur tað starvið eisini stóran áhuga, men sambært keldum í demokratiska flokkinum hevur Barrack Obama longu mannað tann sessin við Rahm Emanuel. Hann er limur í Umboðsmannatinginum og er úr Chicago eins og Obama. Hann hevur tann fyrimun, at hann er ikki heilt ókendur í Hvítu Húsunum, har hann arbeiddi eitt skifti fyri Bill Clinton.

Tann 48 ára gamli Rahm Emanuel kann sambært eygleiðarum tryggja Obama, at demokratiski flokkurin stendur samdur í Kongressini, tá talan er um lógararbeiði. Men hann er ikki líka væl dámdur allastaðni. Hann sigst hava eina hvassa tungu, og tað kann ørkymla tað samstarvið, sum Obama hevur sagt, at hann vil hava við republikanararnar í Kongressini.

## Kend nøvn

Amerikanskir fjølmiðlar hava nevnt fleiri nøvn, sum kunnu hugsast at taka við uttanríkismálum. Eitt av nøvnunum, sum oftast verður nevnt, er senatorurin John Kerry, sum stillaði upp fyri demokratarnar á forsetavalinum fyri fýra árum síðani. Hann hevur drúgvar politiskar royndir og hevur harafturat eina fortíð í amerikanska herinum og bleiv heiðraður fyri dirvi í krígnum í Vietnam.

Ein annar, sum eisini hevur fyritreytirnar fyri at røkja uttanríkismálini, er fyrrverandi diplomaturin Richard Holbrooke. Hann varð í mong ár roknaður sum ein tann besti á sínum øki og hevur millum annað verið ST-sendiharri, ST-semingsmaður í gamla Jugoslavia og varauttanríkisráðharri.

Tey flestu eru á einum máli um, at Barrack Obama fer at taka onkrar republikanarar við í stjórn sína. Summir eygleiðarar halda, at ein republikanari verður kanska uttanríkisráðharri ella verjumálaráðharri, og í sambandi nevna teir senatorin Richard Luger. Hann hevur verið í politikki í mong ár hevur millum annað havt ein leiðandi lut í samráðingum um kjarnorkuvápn.

## Kreppuráðharri

Í teirri fíggjarkreppu, sum USA erí, hevur spurningurin um næsta fíggjarmálaráðharran stóran áhuga.

Onkrir eygleiðarar hava nevnt, at Obama kanska fer at biðja verandi fíggjarmálaráðharran, Henry Paulson, halda fram, til kreppan er loyst. Onnur peika á borgarstjóran í New York, Michael Bloomberg, og uppaftur onnur nevna Paul Volker, sum er fyrrverandi stjóri á amerikanska tjóðbankanum Federal Reserve.

Onnur nøvn, sum hava verið frammi sum møguligur fíggjarmálaráðharri, eru tann kendi íleggjarin Warren Buffet, búskaparfrøðingurin Austan Goolsbee og Jason Furman, sum var ráðgevi hjá Bill Clinton.

## Powell græt

Fleirio hava nevnt, at fyrrverandi uttanríkisráðharrin Colin Powell kann fáa eitt leiðandi embæti í stjórnarumsitingini hjá Barrack Obama.

Powell, sum nú er 71 ára gamal, segði herfyri, at hann styðjaði Obama sum forsetavalevni og ikki flokksfelagan John McCain. Í samrøðu við sjónvarpið CNN í gjár segði Powell, at hann fór at gráta, tá tað var greitt, at Obama hevði vunnið valið.

Obama segði undir valstríðnum, at hann ætlaði sær at biða Colin Powell til ráðgeva, vann hann forsetavalið. Hann hevur ikki sagt nakað um tað síðani, men amerikanskir fjølmiðlar siga, at Powell sjálvur hevur roynt at doyva tosið um, at hann kanska skal í Hvítu Húsini.

Í øllum førum hevur Colin Powell fyritreytirnar sum fyrrverandi generalur, ovasti í herleiðsluni, trygdarráðgevi og uttanríkisráðharri.

## STUTT SAGT

### Kvinnur og minnilutar gjørdu munin

Kanningar av amerikanska forsetavalinum týsdagin vísa, at tað vóru serliga kvinnur og fólk úr ymsum minnilutum, at atkvøddu fyri Barrack Obama. Men kanningarnar vísa eisini, at hann fekk lutfalsliga nógvar atkvøður frá hvítum monnum.

John McCain fekk sambært somu kanningum 55 prosent av atkvøðunum frá teimum hvítu, sum vóru vá vali. McCain fekk lutfalsliga fleiri atkvøður frá hvítum veljarum í statunum har suðuri í USA og helvtina fleiri enn Obama. Lutfallið teirra millum var á leið tað sama sum millum George W. Bush og Al Gore í 2000 og millum Bush og og John Kerry fyri fýra árum síðani, skrivar AP.

Barrack Obama, sum við sínum 47 árum verður ein av teimum yngstu forsetunum, sum USA hevur havt, fekk 34 prosent av atkvøðunum frá veljarunum, sum eru yngri enn 30. Tað er óvanliga nógv, og til sammetingar kann verða nevnt, at Bill Clinton fekk 19 prosent av atkvøðunum frá hesum sama aldursbólki í 1996. Harafturímóti fekk Bill Clinton 70 prosent av atkvøðunum frá teimum, sum vóru ám nvali fyri fyrstu ferð.

### Mandela fagnar Obama

Fyrrverandi suðurafrikanski forsetin Nelson Mandela er fegin um, at Barrack Obama vann amerikanska forsetavalið. Í brævi til tann nývalda forsetan skrivar Mandela, at úrslitið er eitt prógv um, at tann, sum vil broyta viðurskiftini, kann røkka sínum máli.

Mandela heitir á Obama um at virka fyri friði og trygd í heiminum, og hann sigur seg vænta, at Obama fer at styðja bardagan ímóti fátækradømi og sjúkum.

Nelson Mandela stóð á odda fyri teirri fyrstu demokratisku stjórnini í Suðurafrika árini frá 1994 til 1999 eftir at hava sitið í fongsli í 27 ár fyri sítt stríð ímóti tí hvíta minnilutastýrinum. Fyri nøkrum árum síðani vitjaði Barrack Obama fongslið á Robben Island, har Nelson Mandela var fangi. Millum annað vitjaði hann klivan hjá Mandela.